| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 05. mai 2011 |
| Býráðsfundur nr. | 04/2011 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2011 tann 05. mai kl. 15.00 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 28. apríl 2011 um innkalling til fundar. Talan er um útsetta býráðfundin frá 28.apríl 2011, sum borgarstjórin hevði tikið avgerð um at flyta 1 viku.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Gordon M. Petersen
Kristina Toftegaard Larsen
Gudny Vang
Eyðun á Lakjuni
Magnus Midjord
Petur Abrahamsen
Sonni á Horni

Gordon M. Petersen møtti sum varalimur fyri Jann Toftegaard og Gudny Vang fyri Elisabeth D. Eldevig, sum bæði høvdu forfall til fundin

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 10/2011.**

**Mál viðvíkjandi uppskoti til fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri ár 2012.**

Víst verður til skriv frá Føroya Landsbókasavni, dagf. 17. desember 2010 um innlatingarfreist fyri at lata inn fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri rakstrarárið 2012.
Mentamálanevndin hevur móttikið uppskot frá kommunalu fyrisitingini, dagfest 15. apríl 2011 til fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri **árið 2012**.

Sambært uppskotinum verða samlaðu rakstrarútreiðslurnar mettar til kr. 747.500,00 móti mettum kr., 710.000 í 2011. Inntøkurnar av rakstrarstuðningi verða mettar til:

| | |
|---|---|
| Fuglafjarðar kommuna | kr. 448.500,00 |
| Landskassastuðningur | kr. 299.000,00 |
| **Samantals** | **kr. 747.500,00** |

Sum tað sæst, so er lutfalsbýtið millum landskassa og kommunukassa í samsvar við nýggju bókasavnslógina......har býtið millum land og kommunu verður 60% í kommunurnar part og 40% í Landskassans part. Frammanundan var býtið 40% í kommunurnar part og 60% í landskassans part.

Kommunan hevur tó bert fingið kr. 192.000 fyri 2010 sjálvt um fíggjarætlanin fyri 2010 hevur eina rakstrarætlan upp á kr. 659.136, og roknskapurin fyri 2009 hevði eina rakstrarútreiðslu upp á kr. 692.438, sum skuldi givið Bókasavninum ein rakstrarstuðul upp á uml. kr. 277.000.

Soleiðis góðkennir Føroya Landsbókasavn, sum nú er, ikki eina fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar Bókasavn, sum er størri enn kr. 480.000.
Um gongdin verður tann sama, so kann kommunan ikki rokna við einum rakstrarstuðli upp á kr. 299.000, sum henda fíggjarætlan leggur upp til.

Ætlanin hevur verið fyri á fundi í Mentamálanevndini tann 19. apríl 2011 og varð samtykt at taka undir við málinum og mæla býráðnum til at samtykkja tað, ásannandi at rakstrarstuðulin ikki verður 40% av teimum kr. 747.500, men heldur 40% av kr. 480.000.

**Avgerð:**
Tilmæli frá mentamálanevndini varð samtykt. (9-0). Sostatt varð fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2012 endaliga samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 15.35.

Dánjal Vang

Gordon M. Petersen

Gudny Vang

Kristina Toftegaard Larsen

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Magnus Midjord

Sonni á Horni

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen